*Knud Åm, ein av oddamonnunum hjá Phillips á vitjan í Føroyum:*

# Takið eitt stig í senn

***Føroyingar eiga at hava bæði beinini á jørðini og bert taka eitt stig í senn og ikki gera stórar íløgur í eina oljuvinnu longu nú sigur Knúd Åm frá Phillips. Hann ávarar eisini føroyingar móti at vera ov bjartskygdir, tí talan er um eina dúgva gongd - og eingin sigur, at tú finnur olju.***



*Knud Åm hevur drúgvar royndir á oljuøkinum Hann hevur arbeitt hjá Norges Geologiske Undersøgelser, hjá norksa oljudirektoratinum, hjá Statoil og at enda fyrst sum stjóri hjá Philips í Noregi og í dag sum ovasti hjá Philips fyri allari oljuleiting og framleiðslu í heiminum. Her er hann staddur á Kongabrúnni við útsýni til Tinganesi. Mynd jan*

JAN MÜLLER

Hann er eingin tilvildarligur persónur í altjóða oljuverðini Nei, hann telist millum ovastu stjórarnar í einum av heimsins størstu oljufeløgum Talan er um Knud Åm frá Phillips Petroleum, sum er á stuttari vitjan í Føroyum í hesum døgum Í gjár var hann gestafyrilesari á evnisdøgunum fyri politikarar og landsstýrismenn

Sosialurin hitti Knud Åm á Hotel Hafnia seinnapartin í gjár og spurdu vit norðmannin, sum í dag situr millum ovastu leiðararnar í Philips í Bartlesville í Oklahoma, um ein komandi oljuvinna fer at gagna Føroyum!

-Eg haldi, at alt búskaparligt og positivt virksemi fer at gagna Føroyum. Skuldu tit verið so hepnir at finna olju við Føroyar, eri eg sannførdur um, at tað verður eitt positivt íkast til samfelagið

Hvørji ráð hevur Knud Åm tá til føroyingar, soleiðis at vit fáa sum frægast burtur úr gongdini!

-Eg fari at ávara móti ov stórari optimismu í byrjanini. Ein eigur at hava í huganum orðatakið, at „ein skal ikki selja skinnið fyrr enn bjørnin er skotin. Tað er ómetaliga týdningarmikið at hava bæði beinini væl og virðiliga á jørðini og ikki leypa framav, men heldur taka eitt stig í senn.

Hann vísir á, hvussu drúgva tíð tað tók í Norðsjónum, frá tí at tú fór at leita til tú fanst olju. Í norska partinum av Norðsjónum skuldu meira enn 30 brunnar borast, áðrenn olja varð funnin, og í Norðurnoregi - í Barentshavinum - hevur nú verið leitað í 15 ár uttan at nøkur olja er funnin Her eru brúktar meira enn 25 milliardir kr. til leiting uttan at finna nakað nevnivert.

Sjálvandi skulu tit hava vónir, men eg fari at ávara tykkum móti at taka nøkur stór og kostnaðarmikil stig nú ella longu nú at tilrættaleggja, hvat tit skulu brúka pengarnar til, sum møguliga koma.

Knud Åm skilir væl, at føroyingar longu nú tosa nógv um olju og hava stórar vónir, tí oljukeldur eru funnan sær tætt upp at føroyska markinum

-Men aftur vil eg siga, at føroyskir politikarar eiga at vera ómetaliga varnir ikki at taka nakað sum givið longu nú og byrja at tilrættaleggja sum um oljupengarnir skjótt streyma inn í samfelagið Tí heldur hann eisini, at tað er alt ov tíðliga longu nú at tosa um, hvussu møguligar komandi oljuinntøkur skulu brúkast ella sparast upp

Knud Åm er ein teirra, sum hevur lisið frágreiðingina hjá Oljuráðleggingarnevndini og hann heldur tað vera eina sera góða frágreiðing.

-Hon er sera upplýsandi og har er ein javnvág í. Har er bæði góður vísdómur og kunnleiki at lesa í frágreiðingini

Uppá fyrispurning hvat hann heldur um eitt alment føroyskt oljufelag sigur Knud Åm, at hann hevur ikki serligan hug at leggja seg út í eitt føroyskt orðaskifti men kann av egnum royndum bert siga, at skal slíkt felag setast á stovn, so eigur tað at verða rikið eftir handilsligum fortreytum

Hann heldur tað eisini vera í so tíðliga at tosa um eitt slíkt felag, nú tað er so stutt frálíðið í allari gongdini

Knud Åm heldur tað annars vera ómetaliga týdningarmikið at føroyingar fáa eitt lógarverk, áðrenn nøkur loyvi verða givin.

Sjálvur vónar hann, at lógin verður veruleiki um ikki alt ov langa tíð. Hann vil tó ikki leggja seg út í hesi viðurskifti, tí tað eru spurningar, sum føroyingar sjálvir mugu meta um.

## Kvinnuhúsið

**Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvørt hóskveld frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Pløuvørða 2, ella á tlf. 17200.**

**Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 10.00–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 10.00 fyrrapart til kl. 7.00 á morgni.**


VARIANT viðfestisvognar




Manglar tú einhvønn eykalut til vognin, sum t.d.
næsahjól, felgur, dekk, stikkarar, presending, lyktagløs, endurskin, klistrimerki,
so hava vit teir flestu á goymslu.

Vit kunnu útvega
sleipikrókar
til allar bilar.




Umboð í Føroyum
Søla, eykalutir og tænasta.

P/f Kaj Andreasen & Co.
Klingran 5 • 188 Hoyvík
Tlf. 15600

P/F BRØÐUR PETERSEN BILAR tlf. 14360
Brúktir bilar frá Volvo

| | | | |
|---|---|---|---|
| TOYOTA CARINA E<br>árg. 1996<br>Km. 14.000<br>149.000 | TOYOTA CARINA<br>St. árg. 1988<br>Km. 130.000<br>75.000 | VOLVO 440 PACIFIC<br>árg. 1995<br>Km. 39.000<br>115.000 | SAAB 90<br>árg. 1983<br>Km. 108.000<br>19.000 |
| TOYOTA CAMRY<br>árg. 1987<br>Km. 92.000<br>58.000 | RENAULT TWINGO<br>St. árg. 1996<br>Km. 14.000<br>89.000 | OPEL diesel RECORD<br>árg. 1984<br>19.000 | CITROËN BX<br>19.000 |